# Eldrapolitikkur

**Gunnar K. Nattestad**



Nógv verður snakkað, men lítið gjørt; og soleiðis er tað mangan. Eitt av økjunum har hetta man vera væl á leið, er eldraøki.

**Eldraøki**
Pensjónir er ofta tað ið havt verður í huga tá ein nevnir eldraøki. Pensjónirnar eru ein tíðandið partur av karminum um ein góðan/tryggan aldurdóm, men hettar er als ikki alt og heldur ikki meginparturin av tí ið hevur týdning fyri pensiónistin.

**Møguleikar at innrætta seg**
Tað sum eg haldi hevur meira at siga er, "hvat far man fyri pensiónina" og hvussu eru møguleikarnir hjá teimum ið gerðast gomul, at innrætta seg so tey hava ein "ríkan" aldurdóm. Her verður serliga hugsa um tilboð við veruligum innihaldi og møguleikar at búgva so hædd verður tikin fyri likamligu/sálarligu støðuni hjá tí einstaka. (Hettar er annars galdandi fyri einhvønn aldursbólk.)

**Bústaður**
Eitt sum Sambandsflokkurin leggur stóran dent á er, at fólk sum heild skula hava møguleika at búgva í egnum bústaði. Tey flestu hava bygt egin hús og ynskja helst at búgva har so leingi tey liva, men mangan man júst hettar vera ein vansi í tí dagliga. Húsini hava kanska fleiri hæddir og tí er tað ein dagligur trupuleiki at klára trappurnar, tá førleikin versnar. Summi mugu kanska í rullistól og tá er ógjørligt at ferðast sum fyrr. Tørvurin á plássi og innrættan gerst ørvísi og tí er dreymahúsið ikki so praktiskt longur.

Talin á teimum ið slíta seg upp við at stríðast við verandi karmar ella bróta seg sundur tí tey løgdu ov nógv fyri, man heldur ikki vera so lítið. Aftrat hesum eru húsini mangan størri enn neyðugt, m.a. tí at børnini eru flutt.

**Alternativ**
Um útboði av serligum eigaraíbúðum var til, kundu eldri fólk selt síni egnu hús og keypt eina íbúð ið tók hædd fyri teirra førleika og tørvi. Til slíkar íbúðir kundi eisini verði knýtt heimahjálp og aðrar tænastur ið tørvur er á. Soleiðis kundi ein einstaklingur ella hjún, framvegis búð í egnum heimi, ístaðin fyri sum nú, at noyðast á ellisheim sum alternativ til upprunaliga heimið.

**Veruleikin**
Eitt er at hava hugskot til hvat kann gerðast, annað er hvat virkar í veruleikanum. Tað er tungt at siga farvæl til síni egnu hús og tí vilja mong aftra seg vit at flyta, men so leingi einasta alternativið er eitt pláss á ellisheimi, man ein hóskandi eigaraíbúð vera nógv meira tiltalandi.

Tað er eisini ein spurningur um at bróta vanar á hesum økinum, serliga um tað í seinna enda er til fyrimuns fyri tey eldru.

**Aðrir fyrimunir**
Ein onnur síða av sakini er eisini tann, at um nøkur eldir valdu at selja síni hús og flyta í onnur hús/íbúðir ið vóru bygd til teirra førleika, so vildi hettar skapt betri møguleikar hjá yngra ættarliðnum. Tey høvdu kunna keypt fyrru húsini hjá tí eldra aftarliðnum og har við sloppi undan at investera í eini nýggj dýr hús.

Ein tílík loysn kundi sostatt gagna báðum pørtum.

**VIÐMERKINGAR**

# Hví siglir M/B Dúgvan ikki?

**Andras Miðskarð**



Nú er rúm tíð síðan, at Dúgvan skuldi sigla eykatúrar á kvøldi. Seinasti túrur á kvøldi skuldi vera av Leirvík kl. 23.30, sum eg eisini meti at vera ein hóskandi tíð, tá ið vit norðoyingar skulu um fjørðin eftir kl. 21.10. Tá sleppa vit frá at leiða okkum fart.

Kl. 22.30 kann ein rokna við, at ein er liðugur at fundast og gera ørindi í Havn ella aðrastaðir. Nógvir slíkir fundir kunnu fyrst byrja eftir arbeiðstíð, t.d. kl. 19.00. Ein roknar eisini við, at slíkir fundir eru loknir kl. 22.00. Tá er eisini passandi tíð eftir at koyra forsvarliga til Leirvíkar.

Eisini hevði verið møguleiki fyri at flutt eventuellar trailarar o.a. yvir um fjørðin, sum áður var neyðugt at steðga við til morgunin eftir.

Tá ið ein hevur hoyrt, at manning er tøk at takað við, hví verður so ikki triðja vaktin sett? Undirritaði hevur eisini frætt, at teir, ið forða fyri hesari sigling, eru partar av manningini. Orsøkin til tess er, at teir missa yvirtíðina, sum teir fáa eftir verandi vaktarskipan. Um omanfyri nevnda orsøk ikki er røtt, so rætta meg harra Strandferðslustjóri, Reidar Nónfjall.

Ein hevur tí hug at spyrja: "Hvønn siglir Dúgvan fyri? Er tað fyri, at partar av manningini framhaldandi skulu fáa sína yvirtíð? Ella fyri okkum norðoyingar, sum ferðast og flyta farm um fjørðin?"

Tað er væl eingin orsøk, at partar av manningini á Dúgvuni umframt at fáa sína føstu løn, sum teirra størv eisini eru normeraði til, skal verða okkum norðoyingum ein forðing fyri einari betri tænastu um Leirvíksfjørð, meðan bíða verður eftir, at tunnil kemur um fjørðin.

Tá ið menn søkja slík størv, tá má lønin eisini vera nøktandi. Ella søkti eingin hesi omanfyri nevndu størv. Undirritaði, sum eisini er formaður í Norðoya Sambandsfelag, vil minna á, at vit í sambandsflokkinum kenna okkara ábyrgd fyri okkara fólkið í Norðoyggjum. Tí vil eg inniliga heita á Reidar Nónfjall, stjóra á Strandfaraskipum Landsins, at fáa sett hesa triðju vaktina. Teir menn, ið settir verða sum stýrimenn og skipsførarar, skulu helst allir hava skipsføraraprógv. Tí í hesum føri, er eisini talan um ferðafólkaflutning.

Tess skjótari tann triðja vaktin verður sett, tess skjótari liva vit norðoyingar upp til eina tíðarhóskandi tænastu, sum vit nóg leingi hava bíðað eftir.

# Ein heilsan til Margith og Nikkel á gullbrúdleypsdegnum 19. mars 2002

Mamma er ættað úr Porkeri og babba er av Eiði.

Mamma misti mammu sína, tá hon bert var 12 ára gomul. Hon var elst av 4 systkjum, men familjubondini hava verið ógvuliga góð.

Babba hevur verið og er ein góður maður, og tá tað líkaði honum at verða tað mesta á sjónum, meðan vit vóru í uppvøkstri, so kendi hann tó sína ábyrgd fyri okkum, tá hann var heima. Hann er ein friðarmaður við nógvari styrki, men ger lítlan háva burturúr sær sjálvum.

Spennandi var hvørja ferð hann kom heim, tí hann keypti okkum altíð okkurt, tá tað lá honum fyri.

Mamma var ein strang mamma, men sum vaksin síggja vit, at strangleiki hennara var merktur av kærleika til okkum. So var hon eisini, sum so nógvar aðrar mammur í Føroyum, sum hava sjómenn, so at siga einsamøll um at ala okkum upp og taka avgerðir. Hon var ógvuliga røsk og royndi eisini at halda okkum til, so vit kendu til avbjóðing, og hetta kom okkum til góða seinni í lívinum.

Tá alt gongur væl, vísir alt at vera so lætt, men fyri



6 árum síðani bleiv mamma sjúk, og síðani hevur hon verið bundin til rullustólin, tí vinstra síða er lamin, men sum babba sigur so ofta, at tað er hóast alt gott, at hon kann tosa og fylgja við í øllum bæði í bløðunum, útvarpinum og sjónvarpinum.

Annars vita tey alt um børnini og barnabørnini, spyrja hvussu tað gongst okkum og teimum, og taka børnini telefonina, hava mamma og babba altíð okkurt gott orð til teirra.

Tá Óli Karl er á útróðri, ringja tey, líka til hann er afturkomin, fyri at fregnast hvussu hevur gingist, jú, tey hava eina hartaliga umsorgan.

Eg eri sannførd um, at tit hava klára tykkum væl ígjøgnum lívið, sum ikki altíð hevur verið ein dansur á rósum.

Babba eigur eitt stórt rós uppibori, sjálvt um vit vita, at mamma fegin vildi hildið áfram at runni, men við einari góðari fyrimynd hevur babba verið henni ein ómetaliga góður stuðul, nú hon hevur verið so óhjálpin.

Vit hava glett okkum til henda stóra dag, tí 50 ár eru ikki 50 dagar, men vit gleðast saman við tykkum við stórum takksemi í hjørtum okkara, fyri tað tit hava verið fyri okkum og okkara og við hesum orðum ynskja vit tykkum hjartaliga tillukku, og framvegis Harrans ríku signing á leið tykkara.

**Henny**



# Tilfar á skúlunum farið at ganga undan

**Longu nú byrjar at sansa at á nógvum skúlum kring landið. Serstovur kunnu ikki brúkast, tí eingin varðar av teimum og tilfar verður ikki keypt. Eftir páskir rokna skúlastjórar við, at tað ikki ber til at undirvísa í fleiri lærugreinum**



*Á nógvum skúlum verður avmarkað, hvussu nógv næmingarnir kunnu gera av prýði til páskirnar, orsakað av vantandi tilfari*

BLOKADAN
*Turið Kjølbro*

Blokadan hjá Føroya Lærarafelag, sum er vend ímóti savnsrøktini á skúlunum kring landið, letur til at virka. Hóast skúlastjórar og -leiðarar á ein hátt eru forlongdi armurin hjá sínum arbeiðsgevara, Mentamálastýrinum, og hava skyldu til at geva næmingunum ta undirvísing, teir hava krav uppá, eru teir solidariskir mótvegis blokaduni hjá Føroya Lærarafelag.

– Tilfar er farið at ganga undan og einki verður keypt. Eftir páskir rokni eg við, at einki tilfar er eftir í nógvum lærugreinum, serliga í træsmíð, hondarbeiði, og evning, og tá mugu lærararnir hvør í sínum lagi undirvísa næmingunum øðrvísi uttan tilfar. Tað krevur sera nógv av teimum.

– Vit hava eitt sindur av tilfari til at gera páskaprýði burturúr, men tað er minni enn vit vanliga hava til slíkt høvi. Serstovurnar eru ikki so væl hildnar, sum tær vanliga eru. Um einar tveir mánaðir rokni eg við, at ruðuleiki valdar, sigur Marjun Holm, skúlastjóri í Argja skúla.

Eisini á skúlanum við Ósanna í Klaksvík er tilfar við at ganga undan. Skúlin hevur ikki serstovur, men brúkar ístaðin vanligu skúlastovurnar og serstovurnar á grannaskúlanum.

– Er blokadan framvegis í gildi longur út á várið, fer hon at darva nógv. Serliga tær kreativu lærugreinirnar fara at merkja sviðan. Tá ið tilfarið er uppi, mugu lærararnir undirvísa á annan hátt. Teir hava skyldu til at hava næmingarnar kortini. Eg hvørki kann ella vil áleggja lærarum at keypa tilfar. Sum limur í Føroya Lærarafelag kann eg ikki annað enn vera solidariskur yvir fyri blokaduni, sum eg væl skilji, sigur Símun Petur Hjelm, skúlastjóri.

Í kommunuskúlanum á Glyvrum er eisini farið at sansa at.

– Eg havi ikki fingið nakra fráboðan enn um, at serstovur ikki kunnu nýtast, men hinvegin er tað líka við. Uttan tilfar fáa lærarar ikki undirvíst í nógvum lærugreinum, serliga í teim yngru flokkunum, og tí verður í førum talan um ansing heldur enn undirvísing.

– Eftir páskir verður sera trupult at geva eina nøktandi undirvísing, serliga í smíð og evning. Vit hava ikki pappír á goymslu, soleiðis at næmingarnir kunnu gera páskaprýði, tí verður tað sera avmarkað, hvat verður gjørt til páskirnar.

– Eg eri noyddur at vera solidariskur móvegis blokaduni. Sjálvsagt havi er størstan áhuga í, at næmingarnir fáa sum mest burtur úr, men hinvegin noyði eg ikki lærararnar at verða ósolidariskir mótvegis sínum fakfelag, sigur Ásmund Lamhauge, skúlastjóri á skúlanum á Glyvrum.

Felagsskúlin á Oyrarbakka er framhaldsskúli burturav.

– Enn merkja vit ikki nógv til blokaduna. Vit hava køk, sum er undantikin blokaduna, og lívfrøði, alis- og evnafrøði, men tað er ógvuliga avmarkað, hvussu nógv verður keypt inn til tær lærugreinirnar. Fer tilfar at vanta í, krevji eg ikki av lærarunum, at teir keypa inn, tá ið blokada er. So mugu lærararnir undirvísa á annan hátt. Men samstundis sum eg eri solidariskur mótvegis blokaduni, skal eg eisini hugsa um skyldurnar eg havi yvir fyri næmingunum, og tað er ein tvístøða. Tí má eg í hvørjum einstøkum føri meta um, hvørjar skyldur eg havi, sigur Hans Erland í Brekkunum, skúlastjóri.

Tann 20. februar varð blokadan hjá Føroya Lærarafelag víðkað til eisini at umfata savnsrøkt. Tað vil siga, at lærarar skulu ikki at hava umsjón og røkt av amboðum um hendi, rudda høli, skáp, samskipa innkeyp av tilfari, fylgja við í, hvat vantar av tilfari og so framvegis. Stendur ein skúlin og vantar tilfar til næmingarnar at gera páskaprýði burturúr, forðar blokadan hesum, um skúlin ikki eigur slíkt á goymslu. Einasta, sum er undantikið, er dagligt innkeyp av tilfari til heimkunnleika, og vanlig upprudding eftir hvønn undirvísingartíma.

# Skert hátíðarhald

**Mikudagin skal yvirtøkan av skúlanum hátíðarhaldast á skúlunum kring landið, men á nógvum skúlum verður ikki hátíðardámur**

HÁTÍÐARHALD
*Turið Kjølbro*

Fyri sløkum tveimum vikum síðani fingu allir skúlar kring landið boð frá landsstýrismanninum í mentamálum um at brúka mikudagin 20. mars til at hátíðarhalda yvirtøkuna av føroyska skúlanum. Men longu nú letur til, at tað verður ikki stórur hátíðardámur á øllum skúlum.

– Nakað verður gjørt burturúr, men tað verður avmarkað. Vit kunnu ikki keypa tilfar til hátíðarhaldið, um vit hava brúk fyri tí, so tað verður eitt skert hátíðarhald, sigur Ásmund Lamhauge, skúlastjóri á skúlanum á Glyvrum.

Hann fýlist á, at skúlarnir hava fingið ov stutt skotbráð til at fyrireika dagin. Spurdur um lærararnir leggja nógv í dagin, sigur hann.

– Flestu lærararnir halda, at tíðin er ikki tann rætta til at hátíðarhalda yvirtøkuna. Hátíðarhaldið skuldi verið beint eftir nýggjár. Í mínum hugaheimi er tað óveruligt at skipa fyri hátíðarhaldi nú, tí skúlin varð yvirtikin í 1979 fyrisitingarliga og fíggjarliga á nýggjárinum.

– Allir flokkar hava ársætlanir, har øll tiltøk eru tilrættaløgd. Eitt slíkt hátíðarhald grípur inn í ætlanirnar sum eru. Eisini hava vit flokkar, sum eru í starvsvenjing og aðrar flokkar, sum eru í holt við verkætlanaruppgávu. Men vit hátíðarhalda kortini, tí vit hava fingið eini kravboð og bara tí.

Eisini Føroya Lærarafelag finnst at, at yvirtøkan skal hátíðarhaldast nú.

– Flest allir lærarar fara treyðugt undir hetta hátíðarhald, og tað er av fleiri orsøkum. Í fyrsta lagi tí tað er boðað frá við so stuttum skotbráði, í øðrum lagi tí henda tíðin longu er fastløgd í skúlunum, og í triðja lagi tí lærararnir eru rasandi um, at Mentamálastýrið í loyndum hevur fingið nakrar próvtøkuuppgávur til vega so ella so, sigur Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag.

Blokadan hjá Føroya Lærarafelag mótvegis savnsrøktini ger, at skúlarnir ikki kunnu keypa tilfar og annað til hátíðardagin.

Endamálið við hátíðarhaldinum er sambært landsstýrismanninum við mentamálum, at yvirtøkan skal gerast tilvitandi í huga næminganna. Hendan dagin er ætlanin, at allir skúlar í landinum skulu arbeiða við evninum Hin føroyski skúlin/Okkara skúli. Skúlarnir gera sjálvir av, hvussu teir skipa evnisdagin, men innihaldið í degnum skal vera yvirtøkan av sjálvum skúlaverkinum.

– Vóni, at hesin dagurin fer at fáa undirtøku úti á skúlunum, og at hetta tiltakið kann styðja undir tilvitanina um okkara skúlaverk, og at tað nú eru vit einsamøll, ið hava ábyrgdina, bæði fyrisitingarliga, fíggjarliga og námsliga. Tað er okkara ábyrgd, at føroyski skúlin framvegis verður ein mentanarberi og ein kunnleikagevi saman við tí uppfostrandi leiklutinum, sum skúlin altíð hevur havt, at tilbúgva næmingin til tað komandi lívið og samfelagið, sigur Óli Holm, landsstýrismaður, í kunning til skúlarnar.